Í Býin

Hevur tú hug at royna okkurt øðrvísi?

Vitjandi rundan um sjálvtøkuborðið
Mynd: Jens K. Vang

Far so ein túr inn á Nantong í Miðbýnum. Har fært tú alt frá innbakaðum høgguslokki til froskalør í chilisós

MATSTOVA
Óluva Ellingsgaard

Hevur tú hug at fara út at eta, men veitst ikki heilt hvar tú skalt fara. Tú kanska heldur at allar matstovurnar minna í so nógv um hvørja aðra. Far so inn á Nantong í Miðbýnum. Kinesiska matstovan Nantong hevur verið opin í nøkur ár nú, og eg má siga, at tað er nú ikki Nantong, ein fyrst kemur í tankar um, tá tosa verður um at fara út at eta. Tað er spell. Tey hava eitt spennandi matkort at bjóða uppá. Har skuldi verið okkurt fyri ein og hvønn smag, tí lambakjøt og oksakjøt er eisini at fáa, um tú ikki hevur hug at eta høgguslokk.

Týskvøldið fóru ein vinkona og eg ein túr inn á Nantong. Tá tú ert komin upp trappurnar, hoyrir tú beinanvegin tann kinesiska tónleikin, og tá tú ert innkomin, er einki at taka feil av. Budda stendur á diskinum og tekur ímóti. Stólar og borð eru úr kinesiskum sniði. Tað eru lampurnar uppi undir loftinum eisini, sjálvt klæðini hjá tænarunum, og tað er ikki tað tingið har inni, sum ikki er kinesiskt. Tá tú kemur yvir til borið, liggja tveir pinnar ístaðin fyri knív og gaffil!

Klokkan var hálvgum seks, og tað var ógvuliga friðarligt. Tænarin spurdi okkum, um vit heldur vildu hava knív og gaffil, men vit avgjørdu at taka kampin upp við pinnunum - ! Vit vóru samdar um, at høvdu vit eisini siti á pútum á gólvinum, so hevði ivi nokk verið um hvar vit vóru. Tað er ein heilt serlig atmosfera inni. Á vegginum hanga upphang við kinesiskum teknum, og ein ramma við eini rúgvu av kinesiskum skóm, ella sum summi heldur vilja kalla "kinaskógvar". Tá eg spurdi hví, var svarið: kinesiskur kunstur. Eigarin hevði fingið hesa rammu í gávu frá einum føroyingi.

Til forrætt fingu vit okkum, av misgávum - innbakaðan høgguslokk! Tað ljóðar kanska ikki so appititvekjandi, men var, fyri at verða heilt ærlig, slet ikki so galin. Til høvðuðsrætt ótu vit innbakaðan høsnarunga í sætari chillisós. Hetta smakkaði óføra væl, var kanska eitt sindur sterkari enn vit hildu, eftir navninum at døma. Vit tordu ikki so væl at gera nakra villa royndt at bíleggja nakað annað, so sum áll, svínalundir, froskalør ella torsk í sætari chillisós, eftir okkara, eitt sindur misseydnaðu royndt - við høgguslokkinum.

Afturvið at drekka kanst tú, millum mangt annað bíleggja eitt vín kallað sake, sum er eitt japanesiskt ella kinesiskt rísvín.

Á seinastu síðu á matkortinum stendur at lesa, at um tú hevur hug at royna føroyskan mat, sum til dømis skerpikjøt ella grind, viðgjørt á kinesiskan hátt, so er bara at seta teg í samband við kokkin. Hann kann gera hetta klárt til tín ella eitt selskap, um tað skal vera.

Næstu ferð tú fert út at eta, so kundi eitt hugskot verið Nantong. Har fært tú mangt og hvat, tú kanska aldrin hevur roynt áður. Tað er ikki heilt so bíligt, men maturin er eisini so mikið góður, og tænastuna havi eg einki at fílast á. Nú havi eg verið á kinesiskum matstovum aðrastaðni í verðini, millum annað í Hong Kong, og sigast má, at Nantong stendur einki aftanfyri.

Kokkurin í ferð við at flambera mat
Mynd: Jens K. Vang

Í Býin

Kaggin
Fríggjakvøldið
Spæla
Rik
Leygarkvøldið
Tónleikur til kl. 24.00
Mánakvøldið
Dansur við Rik
til kl. 03.30
www.kaggin.fo

Á matarseðlinum
Lætt og leskiligt
Pannukakur v/ ísi ella róma 25,-
Ísur ítil, 2 kúlur 19,-
stórut, 3 kúlur 29,-
Ískakao 25,-
Ísur í soda 25,-
Hóskvøldið 31.05 spæla Déjà-Vu
Hvítusunnudag 3. juni Stongt
2. Hvítusunnudag 4. juni Opið sum sunnudag
Hvørdi tónleikur
café natur
Tlf. 31 26 26

HESA VIKUNA
Ottar "Skottar" Mikudag
Ottar í Funningi. Hóskvøldið
14,95 pr. eind frá 21.00 til 22.00
Martin Kjærbo Fríggjakvøldið
ladies night
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Høgni & Rúni Leygarkvøldið
14,95 pr. eind frá 22.00 til 24.00
Sunnukvøldið KARAOKE
kl. 21.00 – 23.30
FÓTBOLTUR Á STÓRSKÝGGJA
Club 20 Café
Írskur búffur
w/chips, salat & whiskysaða
69,-
Discoteque Club 20
Tingh. vegur • Tórshavn • Tlf. 31 55 20
www.club20.fo

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Felagið Tórshøll
Fríggjadagin
opið frá kl. 17.00 – 04.00
Dansur
frá kl. 21.00 – 24.00
Leygardagin
opið frá kl. 17.00 – 24.00
Hvítusunnudag
stongt
2. Hvítusunnudag
opið frá kl. 18.00 – 04.00
Ørvar spæla
Nú fleiri ódýrar eindir eller dagar
Felagið Tórshøll
Sjóvegsgøta 22
Tlf. 31 15 65

AUTO
-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
Skal tú bil hýra
-so er tað 311234
AUTO
311234

Býin

Náttbussur
Fríggjakvøld og leygarkvøld
Tlf. 22 33 11

Casablanca
Fríggjakvøldið 1/6
Livandi tónleikur í Casablanca
Mánal & Bonnie
Casablanca

Njótið matin í okkara friðsæla og hugnaliga umhvørvi
HOTEL HAFNIA
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postboks 107
110 Tórshavn
Tlf. 31 33 33 • Fax 31 32 50
www.hotelhafnia.fo

Í Býin
hvønn hósdag

fk Mat-seðilin

Lýsingar

NÁTT-BUSSURIN
hjá Beauri Carlsensen
Leygarkvøld
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kirkjubø og Kollafjarðar, tá tráðbeilan fyriliggur)
Onnur kvøld bara koyrsur eftir avtala
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Frá kl. 17.00 – 04.00
Fríggja- og leygarkvøld 17.00 – 04.00